## Bøtur fyri 82.675 kr.

Í døgunum frá 29. oktober til 11. november gjørdi løgreglan kring landið grein 13-kanningar. Hetta við serligum atliti til, hvussu ljósini á bilunum vóru. Í alt vórðu 1.863 akfør kannað, og til samans vórðu 292 bøtur skrivaðar. Í 97 førum vóru ljósini ikki í lagi. 107 bilførarar nýttu ikki trygdarbeltið. 74 bilførarar høvdu einki koyrikort uppi á sær, og í 14 førum varð bót skrivað, tí dekkini ikki vóru í lagi. Samlaða upphæddin fyri bøturnar var 82.675 kr.



## Felagssangur í Havnar Kirkju

Mikukvøldið kl. 20 verður kirkjuárið sungið inn við felgassangi í Havnar Kirkju. Tey bæði kórini, Kristiliga Sangkórið og Kórið Sólarmagn á Velbastað syngja fyri, meðan trompet, violon og urga spæla undir. Sálmarnir, sum sungnir verða, vera í mestan mun advents- og jólasálmar, umframt einstakir sálmar frá hinum høgtíðunum. Tiltakið varir knappan tíma.

# Jólasøla á Verkhúsinum Stíggi

**- Her eru trælutir av ymiskum slagi, seymaðir lutir sum húgvur, taskur, turrikløð, lappar og annað - og her er eisini ymiskt við tilknýti til jólini, sigur leiðarin, Poulina Johannesen**

JÓLASØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú vit koma inn í jólamánaðin, er árliga jólasølan hjá Verkhúsinum Stíggi byrjað. Sølan læt upp í gjár og heldur fram í dag. Hetta er eitt tiltak, sum plagar at fáa dygga undirtøku millum fólk, tí her eru nógvir møguleikar til jólagávukeyp av ymiskum slagi.

Jólasølan var opin í gjár millum klokkan 14 og 18, og í dag verður opið millum klokkan 14 og 19.

Poulina Johannesen, sum er dagligur leiðari, sigur, at flestu lutirnir, sum verða seldir, eru virkaðir av brúkarunum, sum hava sína dagligu gongd í Verkhúsinum Stíggi.

- Her eru trælutir av ymiskum slagi, seymaðir lutir sum húgvur, taskur, turrikløð, lappar og annað - og her er eisini ymiskt við tilknýti til jólini, eitt nú nissur, einglar og jólakalendarar.

Hon sigur, at felags fyri jólasøluna er, at Verkhúsið Stíggjur ynskir at selja teir lutir, sum brúkarar virka.

- Men her eru eisin ymiskir keyptir lutir, sum okkara fólk eitt nú hava málað og pyntað. Á ymiskan hátt hava brúkararnir verið við í øllum, sum vit selja, sigur hon.

Á Verkhúsinum Stíggi kunnu fólk eisini keypa møblar til barnakømur, seingjarklæði og annað.

### Vælumtókt søla

Poulina Johannesen, sum hevur verið dagligur leiðari síðan byrjanina í 1993, sigur seg vænta at síggja nógv fólk, nú árliga jólasølan er.

- Undanfarin ár hevur sølan fingið stóra undirtøku, og nógv fólk hava vitjað inni á gólvinum hesar báðar dagarnar.

Umframt jólasøluna, sum byrjaði í gjár og heldur fram í dag, er handilin opin vanligar dagar frá klokkan 9-16 og fríggjadag frá klokkan 9-14.

- Vit fara at hava opið líka fram til jólar og lutir, sum møguliga ikki verða seldir á sjálvari jólasøluni, kunnu seinni keypast í handlinum, sigur Poulina Johannesen.

Á Verkhúsinum Stíggi á Høgabóli hava 22 brúkarar sína dagligu gongd, og har eru seks fulltíðar starvsfólk.



*Jólasølan hjá Verkhúsinum Stíggi byrjaði í gjár og heldur fram í dag, tá opið er frá klokkan 14-19*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Anna Kathrina í Smiðjuni í Lítluvík



**Í dag letur upp forvitnislig listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har Anna Kathrina Højgaard fer at sýna fram sína fjølbroyttu list**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hon er útbúgvin fotografur, men dugir meira enn at taka myndir. Í listarligum høpi er hon ikki ókend í Føroyum. Hon hevur havt fleiri framsýningar, bæði her heima og uttanlands. Nú verður so aftur høvi at síggja hennara fjølbroyttu listarligu evni á framsýning, sum letur upp í Smiðjuni í Lítluvík seinnapartin í dag.

Anna Kathrina Højgaard hevur tikið ymisk skeið innan grafikk í Danmark, og hon hevur eisini fingist við at mála, síðan hon var eini 12 ára gomul.

- Eg havi umleið 15 málningar og myndir við á framsýningini hesaferð, og hetta eru bæði oljumálningar, grafikkur og ymiskt foto, sum eg havi lagt litir á við spreiði ella pensli. Hetta eru tí ikki bert vanligar fotomyndir, men myndir, sum eg havi gjørt ymiskt við, sigur hon.

Anna Kathrina hevur fleiri ferðir áður havt framsýningar í Smiðjuni í Lítluvík.

- Eg haldi, at eg fyrstu ferð var í Smiðjuni við fotomyndum í 1984, sigur hon.

Fotografurin og listarkvinnan hevur eisini verið við á fleiri várframsýningum, og hon hevur eisini havt framsýningar í Danmark.

### Fjølbroytt kvinna

- Eg byrjaði at mála sum 12 ára gomul, og seinni fór eg at læra til fotograf, tók skeiðir í grafikki og fór undir ymiskar samansetingar av list. Eg geri sjáldan bara tað eina, tí mær dámar at "spjaða" meg yvir ymiskt á listarliga økinum. Kanska heldur onkur, at hetta kanntykjast ov "forvirrisligt", men mær dámar at gera tað so. Onnur mugu so bara meta um tað, sum eg geri, sigur Anna Kathrina Højgaard.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík letur upp í dag kl. 16 og verður opin til kl. 19. Í morgin og sunnudagin verður opið millum kl. 15 og 19 og mánadagin, týsdagin og mikudagin millum kl. 16 og 19.

*- Eg geri sjáldan bara tað eina, tí mær dámar at "spjaða" meg yvir ymiskt á listarliga økinum, sigur Anna Kathrina Højgaard*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*